FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# SØLA AV "TUNNLUM" Á HAVNARØKINUM Í FUGLAFIRÐI

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið niðan fyri standandi ognir, sum fyribils verða knýttar til matr. nr. 239am á havnarøkinum í Fuglafirði, til sølu, hetta sambært § 1 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Talan er um:**

1. Tunnil I, sum sambært uppmálingum er 9.900 $m^3$ við eini samlaðari gólvvídd upp á 1.360 $m^2$.
2. Tunnil III, sum sambært uppmálingum er 19.600 $m^3$ við eini samlaðari gólvvídd upp á 2.500 $m^2$.
3. Tunnil V, sum sambært uppmátingum er 22.500 $m^3$ við eini samlaðari gólvvídd upp á 2.975 $m^2$

Upplýsast skal, at kommunan hevur langtíðarleigusáttmála við P/F Bergfrost fyri Tunnil I og III, meðan ein stuttfreistaður leigusáttmáli er við P/F Havsbrún fyri Tunnil V.

Leigarin av tunnil I og III hevur sjálvur gjørt tekniskar installatiónir til og í sjálvum tunnlunum, sum ídag verðar nýttir sum frystigoymslur og virksemi annars í hesum sambandi. Tí verður neyðugt hjá møguligum keypara, um hesin er annar enn leigarin, at fáa avtalu við henda um víðarileigu ella yvirtøku av gjørdum installatiónsíløgum vm.

Tunnil V verður ídag nýttur sum goymsla hjá P/F Havsbrún.

Møgulig áhugað verður biðin um at seta seg í samband við Pætur Joensen, býarverkfrøðing á telefon 737705, Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702 ella Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777.

Ognirnar verða lýstar til sølu við teirri treyt, at kommununi stendur frítt av velja millum innkomin tilboð ella einki at taka, sí § 6 í kunngerðini.

Møgulig tilboð, ið skulu verða skrivlig skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. juni 2009 kl. 16.00.

Innkomin tilboð verða viðgjørd í trúnaði, til ognirnar eru seldar.

*Fuglafjørður, tann 03. juni 2009*

**Fuglafjarðar býráð**


Kom og steðga vónloysinum

Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga píning. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

# KUNNGERÐ UM RUDDING

Fuglafjarðar kommuna hevur sett sær fyri, at bilvrak, akfør, bingjur og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu verða beind burtur og latin góðkendum móttakara.

Sambært § 1 í umhvørvislógini og § 1, stk. 4 í náttúrufriðingarlógini er ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttanduraøki, og í § 10 um burturkast stendur, at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Í § 61 í ferðslulógini stendur, at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan 17. juni 2009, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

**Fuglafjarðar kommuna**
**og**
**Sýslumaðurin**

# Ættarstevna

1.august 2009 verður ættarstevna

**Uttan fyri Garðar í Hoyvík**

Allir eftirkomarar við maka eftir

Simon(Símun) Joensen (f.1798) av Glyvrum,

Charlotte Maren Amalie Reinert (f.1810)
úr Kaldbak (fyrra gifta) og

Johanne Sophie Joensdatter (f.1813)
av Nesi (seinna gifta),

ið vóru fyrstu niðursetifólk
Uttan fyri Garðar í Hoyvík,

verða bodnir á stevnu.

Á heimasíðuni **hoyvik-fo.com** er skrá um tiltakið, hvussu tú teknar teg, kostnaður o.a.

**Hevur tú ikki atgongd til alnótina, so ring til Símun Mittún 218408**

Flagtekju?

Norskar flagtekjur
Skjótt og ómakaleyst
Eisini hava vit nævur og torvhaldsjørn.
Ring og fá eitt óbindandi tilboð.

SJÓVINNUBÚÐIN

v/ Jákup á Lag · P.O. Boks 230 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 584020 · sjovinnubudin@kallnet.fo

## Tvingsilssøla yvir partabrøv í P/F Útgerðarfelagið

**Týsdagin tann 18. august 2009, kl. 10:00** verður á Dómaraskrivstovuni, rættarsali V, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir partabræv nr. 1 – 8, áljóðandi hvørt á kr. 100.000,00, og partabræv nr. 20, áljóðandi kr. 50.000,00 í P/F Útgerðarfelagið heimahoyrandi á Tvøroyri.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn **týsdagin, tann 4. august 2009 kl. 10:00,** og er tann, ið metir seg at hava veð ella onnur rættindi í partabrævinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, adv., v/Mimi Steintórsdóttir, adv.ft., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260** (sak nr. 4989901), sum kann geva nærri upplýsingar um partabrævið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-14/2009).

**Føroya Fútarættur**

## Tvingsilssøla yvir partabræv í Landingarmiðstøðin á Tvøroyri P/F

**Týsdagin tann 18. august 2009, kl. 10:00** verður á Dómaraskrivstovuni, rættarsali V, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir partabræv nr. 5, áljóðandi kr. 50.000,00 í Landingarmiðstøðini á Tvøroyri.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn **týsdagin, tann 4. august 2009 kl. 10:00**, og er tann, ið metir seg at hava veð ella onnur rættindi í partabrævinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, adv., v/Mimi Steintórsdóttir, adv.ft., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, www.lawfirm.fo** (sak nr. 4989901), sum kann geva nærri upplýsingar um partabrævið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-15/2009).

**Føroya Fútarættur**



## Land Rover Freelander 2.0 LN

Silvurgráur, árg. 2003, koyrt 100.000 km, diesel.
Verður seldur vegna flyting. Ein eigari.
Bilurin er í sera góðum standi. Kr. 175.000,-
**Tel. 313210 ella 220581**

Lesið Sosialin - so eru tit við

